*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 4 | Veturin 2023/2024 | pedagogfelag.fo



Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent
www.foroyaprent.fo

Upplag
2.000 eintøk

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Annika Østerø
Skrivari
annika@pedagogfelag.fo



Harald Joensen
Nevndarlimur
harald@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

**4** Tvørligar sáttmála-samráðingar

**10** At skapa relasjónir er góð námsfrøði



**19** Jamen, námsfrøði er relasjónir

**23** Eftirkannið limaskapin



# ODDAGREIN

Jógvan Philbrow, formaður, skrivar

# GJÓGVIN VEKSUR, OG RÆTTVÍSISKENSLAN MINKAR

Enn sita vit við samráðingarborðið – men vit eru farin at spyrja okkum, hvussu leingi vit skulu lata tolið ráða, og um vit yvirhøvur skulu taka medábyrgd fyri, at tey, sum vald eru at stýra hesum landinum, stýra seg og okkum øll út av eggini.

Undir verkfallinum hjá sjúkrarøktarfrøðingunum gjørdu vit saman við fleiri øðrum fakfeløgum vart við, at samráðingarleisturin hjá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum var átaluverdur. Flest okkara uppliva, at samráðingar bara eru eitt eiti. Tær eru ikki veruligar, tí karmurin er so fastlæstur, at sjálvt smálutir kunnu ikki førkast, og tað ber ikki til at gera avtalur, ið leggja upp fyri serligum viðurskiftum hjá einstøkum feløgum.

Samstundis er samráðingarleisturin merktur av, at langt er ímillum stuttar fundir, har tað síðan er ivasamt, um samráðingarfólkini hava neyðugu heimildirnar og rásarúmið at kunna gera skilagóðar semjur.

Okkara sáttmálamótpartur, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum, kemur ikki á samráðingarfundirnar við nøkrum framskygdum hugsjónum fyri okkara virkisøki. Í hvussu er hava vit ilt við at fáa eyga á tær. Teirra uppgáva tykist vera óbroytilig, sum rist í stein, nevniliga at sum minst skal broytast. Status Quo skal varðveitast.

Men tað kemur ikki av ongum, at politikararnir hava ásannað tørvin á einum lønarlyfti. Tað er ein viðurkenning av, at alt ikki er í lagi. Og tað er rætt, tí alt er verri enn so, sum tað eigur at vera.

Formaðurin í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum hevur skrivað, at hann hevði ynskt, at lønarlyftið bleiv gjørt øðrvísi – sum ein partur av einum meira smidligum karmi. Hesum eru vit ikki ósamd í, tí tað eru fleiri viðurskifti hjá okkara limum, ið treingja til at verða dagførd.

Men har gerst onki, tí tað er ikki rúm fyri at gera nakrar broytingar, uttan so at vit gjalda fyri tað við at taka av okkara egna lønarkarmi. Og tað er tað enn minni rúm fyri, hyggja vit eftir lønarlagnum. Har eru vit øll eftirbátar – hjálparfólk, námsfrøðihjálparar, námsfrøðingar og leiðarar. Eisini í eftirlønini eru vit eftirbátar, okkara eftirlønargjøld eru millum tey lægstu í landinum. Og tímalønin er eisini lág samanborið við onnur fakøki við líknandi útbúgvingarstigi og ábyrgd.

Lønarlyftið er sjálvandi kærkomið og hjálpir upp á støðuna hjá tí einstaka liminum, men tað hjálpir í roynd og veru ikki uppá bygnaðarligu trupulleikarnar, sum eru í skipanini, millum annað at tað í nógvum førum hvørki eru logiskar ella sakligar grundir fyri lønarmunum og munum í arbeiðsviðurskiftum annars á arbeiðsmarknaðinum.

Fá tykjast hava hugsjónir og dirvi, at royna at loysa hesar trupulleikarnar. Vit síggja longu nú avleiðingarnar av stívrenda samráðingarháttinum, sum almennu arbeiðsgevararnir tvíhalda um, tí fleiri sáttmálar eru longu undirskrivaðir – sáttmálar sum í útgangsstøðinum hava ógvuliga ymiskar lønir, men kortini verða trýstir inn í ein og sama lønarkarm. Úrslitið sigur seg sjálvt, lønarlagið verður uppaftur meira skeiklað, og lønarlyftið, sum ætlaðist at skula javna lønarmun, tað verður jú ikki regulerað við lønarkarminum og hevur tískil longu mist nógv í virði.

Fyri okkum er tað eyðsýnt, at nýggjar hugsanir mugu vinna frama, um vit vilja sleppa undan støðugt vaksandi óskili á arbeiðsmarknaðinum. Gjógvin millum hálønt og láglønt gerst bara størri, og rættvísiskenslan minkar samsvarandi.

Um politiska skipanin ikki tekur sær um reiggj og bjóðar inn til veruligan dialog um grundleggjandi broytingar á arbeiðsmarknaðinum, so fara vit at fáa støðugt fleiri sáttmálaósemjur, verkføll og framhaldandi flýggjan úr láglønarstørvunum. Hetta hendir samstundis, sum øll eru so hjartans samd um, at okkum tørvar hesi fólkini, tí samfelagið steðgar upp, um tey ikki eru til arbeiðis.

Eina løtu kann innflutt arbeiðsmegi kanska halda skútuni lens, men tað er ikki nøkur haldfør loysn. Tey eru her til láns, og kunnu rýma eftir eini løtu, um umstøður, sum vit ikki eru harrar yvir, broytast tað minsta.

Nú steðga vit so á við samráðingunum í nakrar dagar, og fari eg at enda at ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

# TVØRLIGAR SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

**Arbeiðstíðarreglur arga eisini í samráðingunum hjá Pedagogfelagnum, ásannar Jógvan Philbrow. Sjálvur karmurin er eisini ein trupulleiki, tí felagið kann ikki góðtaka, at fyrsta sáttmálaárið skal ganga heilt til 1. apríl næsta ár, áðrenn námsfrøðingarnir fáa ta lønarhækkingina, sum onnur fáa afturvirkandi frá 1. oktober í ár**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Verkfallið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum, serliga tíðin aftaná, meðan semjan hjá teimum varð tugd ígjøgnum nakrar ferðir og nú er so nøkulunda sodnað, hevur ikki bøtt um samráðingarstøðuna hjá Pedagogfelagnum, heldur Jógvan Philbrow, formaður.

Tí eitt týðandi mál hjá Pedagogfelagnum í hesum samráðingunum er at fáa semju um arbeiðstíðarreglur á øllum økjum, har ongar eru í dag, og at fáa dagført tær, sum hóast alt eru galdandi á serøkinum.

Sum skilst var tað í stóran mun fullkomin naggatódn í spurninginum um júst betri arbeiðstíðarreglur, ið var høvuðsatvoldin til seks vikur langa verkfallið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum. Hinvegin vóru tað eisini ávísir batar á økinum, ið at enda fingu sjúkrarøktarfrøðingarnar at gloypa einum semingsuppskoti 14. november og enda verkfallið.

Men tað er ikki alt gull, ið glitrar, sigur orðatakið, og gomul orðatøk eru júst gomul, tí tey so ofta mugu sannast.

– Við fyrsta eygnabrá helt eg, at sjúkrarøktarfrøðingarnar høvdu gjørt kvetti, men tað vísti seg skjótt, at tað høvdu tey ikki. Gaman í er tað tað fyrsta felagið, ið sleppur fram at at samráðast, sum fær ta ivasomu æru at leggja karmin saman við sáttmálamótpartinum, men tað merkir ikki, at tað felagið fær í posa og sekk í mun til hini. Tað vænti eg heldur ikki, at sjúkrarøktarfrøðingarnir halda seg hava fingið, tá hinir sáttmálarnar nú bara koma raplandi uttan eitt einasta svørðslag.

– Aftaná verkfallið er so komið í ljósmála, hvat tað serliga var, sum stríðið stóð um, og tað vísti seg í stóran mun at vera arbeiðstíðarreglur. Uttan at fara í smálutir, so kann eg í hvussu er staðfesta, at arbeiðstíðarreglur eisini er eitt evni, sum fyllir heilt nógv hjá okkum. Tað má tað gera, tí arbeiðstíð er so



*– Eg skal hugsavna meg um okkara samráðingar, og ikki um, hvat onnur hava fingið ella ikki fingið. Men sjálvandi hoyri eg, hvat partarnir siga. Tað eru ógvuliga nógv prinsippir í hesum við arbeiðstíðarreglum, sigur Jógvan Philbrow, formaður í Pedagogfelagnum*

Mynd: Ingolf S. Olsen

týdningarmikil partur av gerandisdegnum hjá fólki – og serliga, um hon er óskipað, sigur Jógvan Philbrow.

## Svikin og lumpað

At sjúkrarøktarfrøðingarnir eru vónbrotnir, er onki dulsmál. Fimm minuttir á Facebook kunnu sannføra tey flestu um tað. Forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fær tó uppborið dyggan stuðul fyri at hava staðið sum drangur í brimi í einari ógvuliga truplari orrustu.

Nú aftaná kenna tey seg tó lumpað – eftir fyrst at hava kent seg so dyggiliga svikin av samgonguni longu undir sjálvum verkfallinum, tí hon fór í Løgtingið at lóggeva undantøk frá verkfallinum ígjøgnum. Og síðan lumpað, tí blekkið var valla tornað á semjuni við sjúkrarøktarfrøðingarnar, so skrivaðu onnur feløg undir sáttmálar, ið sóu út av meira. Eitt felag skrivaði undir, longu meðan verkfallið leikaði upp á tað harðasta.

## Avmarkað avtala

Um hesir sáttmálarnir so bara síggja út av meira, ella teir veruliga eisini geva meira, veldst um virðið á batunum í serliga arbeiðstíðarreglunum hjá sjúkrarøktarfrøðingunum. Tað letur seg illa prógvað, men nógv halda batarnar vera dýrt keyptar, og



onkur ivast í, um teir yvirhøvur skuldu verið keyptir.

Tað hevur Jógvan Philbrow ikki hug at viðmerkja.

– Eg skal hugsavna meg um okkara samráðingar, og ikki um, hvat onnur hava fingið ella ikki fingið. Men sjálvandi hoyri eg, hvat partarnir siga. Tað eru ógvuliga nógv prinsippir í hesum við arbeiðstíðarreglum. Tær snúgva seg jú í stóran mun um at kompensera tey, sum arbeiða í vaktum ella skeivar tíðir – altso tey, sum ikki passa inn í eina normalviku eftir sáttmálanum, sigur hann.

Í roynd og veru finst ein gomul avtala við Fíggjarmálaráðið um júst arbeiðstíðarreglur. Avtalan er frá 1. mars 200, men hon er ongantíð dagførd, og er sambært Jógvani Philbrow ikki tíðarhóskandi longur.

– Avtalan fevnir at kalla bara um serøkið, altso stovnarnar undir Almannaverkinum, og hon treingir harðliga til at dagførast. Vanliga er trýstið heldur ikki tað sama á serøkinum sum á teimum kommunalu stovnunum, ella tað er í hvussu er av einum øðrum slag.

– Stóri trupulleikin er, at vit snøgt sagt ongar brúkiligar reglur hava um arbeiðstíðina á øðrum arbeiðsøkjum. Nógv tað størsta av teimum er sjálvand dagstovnaøkið, men tað er

*– Eg vænti, at tað hevði verið ein semja, sum kom á eitt ógvuliga turt stað hjá rættiliga nógvum. Tí skuldi tað eydnast okkum at gjørt semju fyri jól við 3,8 prosent lønarhækking 1. apríl í ár og 4,2 prosent 1. oktober í ár, so hevði tað merkt eina eyka lønarútgjalding upp á eini 6.000 – 7.000 krónur hjá einum miðalløntum limi í Pedagogfelagnum*

eisini hent øgiliga nógv síðan 2008. Til dømis í fólkakúlanum, har støðugt fleiri námsfrøðingar arbeiða. Vit hava jú fingið forskúlar, og fleiri sertilboð verða ment. Allar bygnaðarbroytingarnar í Almannaverkinum seta eisini øðrvísi krøv til arbeiðstíð, sigur hann.

## Prinsipiellir trupulleikar

Arbeiðstíðarreglur skulu í fyrsta lagi leggja upp fyri, at nógvir námsfrøðingar og hjálparfólk arbeiða skeivar tíðir, ella í vaktum. Nógv arbeiða eisini niðursetta tíð, tí tey ikki fáa tilboð um fulla tíð.

Ongin kann tvinga fólk at arbeiða skeivar tíðir ella í vaktum, men tað kann vera ein fortreyt fyri yvirhøvur at fáa eitt ávíst arbeiði.

– Tá tú til dømis ikki arbeiðir innan fyri karmarnar á eini vanligari 40 tíma viku í dagtímunum – onkur sáttmáli hevur styttri arbeiðsviku – so arbeiðir tú, tá flest onnur hava frí, og tá tú samanborið við normala arbeiðstíð eisini átti at havt frí. Og har renni eg meg persónliga í nakrar gevalidigar prinsipiellar trupulleikar, tá eg hoyri retorikkin frá arbeiðsgevarasíðuni. Tí sum eg skilji tað, krevja tey, at allir batar á økinum skulu mótroknast í karminum.

– Tú skalt við øðrum orðum brúka burtur av felags lønarkarminum fyri at fáa arbeiðstíðirnar skipaðar soleiðis, at tað yvirhøvur ber til at arbeiða. Tað svarar nøkulunda til, at tað skuldi verið fíggjað av lønarkarminum, um fólk skulu á vesi í arbeiðstíðini, sigur Jógvan Philbrow.

## Óskipað fyrireiking

Nógv umrødda fyrireikingartíðin er heldur ongantíð sett í system og skipað við føstum reglum. Úrslitið er, at hon á nógvum námsfrøðiligum arbeiðsplássum er vorðin ein stressfaktorur, tí roynt verður sum best at trýsta hana inn onkustaðni – ella tíð als ikki verður brúkt til fyrireiking, tí fólk halda tað vera meira møði enn føði at fáa hana at passa inn í eina arbeiðsviku.

– Tá fyrireikingartíðin kom, var tað ein sigur – ein lítil sigur, ja, men hóast alt vunnin rættindi, og endiliga eitt úrslit eftir fleiri ára stríð. Vit fingu hana í sáttmálan, men arbeiðsgevararnir hava ongantíð viljað sett tíð av til hana, altso við at marka tímar til fyrireiking ella okkurt líknandi. Um vit til dømis nú skulu mótrokna fyrireikingartíðina í lønarkarminum fyri at fáa hana skipaða, so merkir tað, at vit í veruleikanum ongantíð hava fingið hana. Og ganga vit við til sovorðið, so er tað tað sama sum at frásiga sær rættindi, og tað kann sammetast við at fremja halgibrot, um ein fakfelagsleiðsla ger tað, staðfestir Jógvan Philbrow.

## Skeiklaður karmur

Ein annar kamelur á vegnum, sum formaðurin í Pedagogfelagnum ætlar at sleppa framvið uttan at svølgja hann, er sjálvur lønarkarmurin. Tí hann er – við Fíggjarmálaráðnum sum høvuðsarkitekti – langt síðan skeiklaður so nógv sambært formanninum, at tað gevur ikki meining at tosa um ein felags lønarkarm, um allir sáttmálarnir skulu fevna um trý ár við somu prosentvísu lønarhækking fyri hvørt byrjað sáttmálaár.

Tí teir almennu sáttmálarnir, sum samráðst verður um nú, ella sum bíða eftir tørni, eru ikki javngamlir.



Fleiri gingu út 1. oktober í fjør, onkrir á nýggjárinum, og teir hjá Føroya Pedagogfelag 1. apríl.

Kortini krøkir Fíggjarmálaráðið teir saman og letur, sum um teir byrja og enda samstundis.

Skal tann leisturin fylgjast í sáttmálunum hjá Føroya Pedagogfelag, fáa námsfrøðingar og hjálparfólk lønarhækkingina upp á 3,8 prosent afturvirkandi frá 1. apríl í ár, tá gamli sáttmálin gekk út. Men eitt felag, sum til dømis Búskapar – og Løgfrøðingafelag Føroya, sum júst hevur gjørt nýggja semju við Fíggjarmálaráðið, fær síni 3,8 prosent afturvirkandi frá 1. oktober í fjør. Tí tá gekk teirra sáttmáli út.

Tað merkir eisini, at tað felagið og øll hini, sum hava bíðað eftir nýggjum sáttmála síðan 1. oktober í fjør, og sum fáa sáttmálarnar til høldar nú, eisini fáa lønarhækking nummar tvey beinanvegin og afturvirkandi frá 1. oktober í ár. Tí tá hækkar lønin samsvarandi lønarkarminum, ið Fíggjarmálaráðið tvíheldur um, við 4,2 prosentum. Námsfrøðingar og hjálparfólk fáa afturímóti ikki hesa lønarhækkingina fyrr enn 1. apríl næsta ár.

– Í mínum heimi er tað ein sjálvfylgja, at okkara sáttmálaskeið verður synkroniserað per 1. oktober í ár, so vit eisini fáa hasi 4,2 prosentini oman á lønina tá. Hugsa vit um høgu inflasjónina, sum hevur verið tey seinastu tvey-trý árini, so hava vit longu bløtt í mun til tey flestu av hinum feløgunum frá 1. oktober í fjør, tá teirra fyrstu 3,8 prosent fáa virknað, og til okkara fáa virknað 1. apríl í ár, sigur Jógvan Philbrow.

Hann vissar tó um, at Pedagogfelagið ongar ætlanir hevur um at krevja lønarhækking afturvirkandi inn í eitt tíðarskeið, tá gamli sáttmálin enn hevði gildi:

– Nei sjálvandi gera vit ikki tað, men nettupp høga inflasjónin ger tað so innlýsandi, at tú kanst ikki bara greipa so ymisk tíðarskeið og siga, at her skal vera ein og sami karmur.

## Limir í ringari støðu

Sjálvt um vónirnar ikki eru tær bestu, so merkist týðuliga, at Jógvan Philbrow inniliga meinar tað, tá hann sigur, at besta jólagávan hjá nógvum limum í Føroya Pedagogfelag, helst man vera ein semja, sum í hvussu er gongur ynskinum um lønarkarmin á møti.

– Eg vænti, at tað hevði verið ein semja, sum kom á eitt ógvuliga turt stað hjá rættiliga nógvum. Tí skuldi tað eydnast okkum at gjørt semju fyri jól við 3,8 prosent lønarhækking 1. apríl í ár og 4,2 prosent 1. oktober í ár, so hevði tað merkt eina eyka lønarútgjalding upp á eini 6.000 – 7.000 krónur hjá einum miðalløntum limi í Pedagogfelagnim.

– Tað er absolutt ikki nakað, eg bara sigi til stuttleika, tí eg eri stórliga bangin fyri, at fleiri av mínum limum eru ímillum tey alt ov nógvu, sum vit nú hoyra um noyðast at biðja um hjálp frá góðum fólki fyri at fáa mat á borðið. Tað er hart hjá øllum lágløntum at fáa endarnar at røkka saman, men tað eru sjálvandi fyrst tey, ið ikki sleppa at arbeiða fulla tíð, sum fáa sviðan av ógvusligu príshækkingunum at merkja, og nógvir av limunum í Pedagogfelagnum eru í tí støðuni, sigur formaðurin í Pedagogfelagnum.



# At skapa relasjónir er góð námsfrøði

**Relasjónir er eitt tað mest nýtta hugtakið í námsfrøðini, og ein ógvuliga stórur partur av øllum námsfrøðiligum arbeiði snýr seg um at skapa relasjónir. Tað liggur tí nær at hugsa, at námsfrøðingar vita tað, sum er vert at vita um relasjónir. Men teir vilja fegnir vita og læra meira, tað vísti stóri áhugin, sum var fyri evniskvøldi um relasjónir, ið Námsfrøðingaráðið skipaði fyri í Klaksvík við Jóhannesi Miðskarð sum fyrilestrahaldara**

ORÐ OG MYNDIR:
INGOLF S. OLSEN – PRESS

Okkurt um 70 limir í Pedagogfelagnum møttu upp og nakað fleiri høvdu teknað seg, tá Námsfrøðingaráðið 27. september skipaði fyri evniskvøldi um relasjónir. Tiltakið var í frítíðarskúlanum Snjallubjallu í Klaksvík, og í Námsfrøðingaráðnum vóru tey stak væl nøgd við undirtøkuna.

Fyrilestrahaldari var Jóhannes Miðskarð, cand.pæd og ph.d. í læring, leiðslu og arbeiðsorganisering. Hann virkar sum sjálvstøðugur fyrilestrahaldari og ráðgevi í Føroyum og í Danmark, har hann býr.

Jóhannes Miðskarð er framúr kønur á sínum øki – ella økjum, tí hann spennir víða – og áðrenn hann fyri skjótt trimum árum síðan gjørdist sjálvstøðugur, undirvísti hann í 10-11 ár á bæði námsfrøðingaútbúgvingini og læraraútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum.

Tí eru tað nógvir námsfrøðingar, sum hava havt hann sum lærara ella vegleiðara í sambandi við til dømis bachelor-uppgávur. Hann fann skjótt fleiri kend andlit ímillum tey, sum vóru møtt upp í Snjallubjallu og dugdi at brúka hesar sínamillum relasjónirnar, sum kundu staðfestast beinanvegin, sum lopfjøl at leypa út í evnið.

## Filosoffarnir

Sum tann royndi undirvísarin og pedagogurin hann er, lá alla tíðina væl fyri hjá Jóhannesi Miðskarð at taka í nógvu træðirnar, sum myndaliga sæð flákraðu í luftini, sum kvøldið leið, og knýta teir saman. Júst sum í hugmyndini hjá Hannah Arendt, týskt-jødiska heimsspekinginum, ið sá sambond-



*– Eg brúki nógv heimsspeki og heimsspekingar í mínum virksemi – eg elski heimsspeki, segði Jóhannes Miðskarð.*



*Stórur áhugi var fyri evniskvøldinum um relasjónir, ið Námsfrøðingaráðið skipaði fyri í Klaksvík*

ini – relasjónirnar – ímillum menniskju sum eina tætt spunna eiturkoppanót.

Hannah Arendt hevði eisini slóðbrótandi teoriir og meiningar um bæði skúlaskap og námsfrøði, og hóast tað eru 48 ár síðan, hon doyði, hevur áhugin fyri hennara politisku teorium og hugsanum ongantíð verið størri enn tað sama.

Jóhannes Miðskarð duldi ikki, at hon saman við Søren Kierkegaard, ein annar navnframur heimsspekingur, var hansara yndisheimsspekingur. Tað letur seg eisini nærum prógvað við at leita sær inn á almenna listan yvir fyrilestrar, hann bjóðar sær at halda – har eru ikki minni enn tveir, sum taka støði í teoriunum hjá Hannah Ahrendt.

– Eg brúki nógv heimsspeki og heimsspekingar í mínum virksemi – eg elski heimsspeki, segði Jóhannes Miðskarð.

Á evniskvøldinum í Klaksvík tók hann eisini dúgliga afturíaftur teirra hugsanir, serliga tær hjá Hannah Arendt um relasjónir og rúmini – ella sferurnar – sum tær virka í, og tær hjá Søren Kierkegaard um tað at vera sannur – autentiskur.

## Egnar royndir

Jóhannesi Miðskarð nýttist tó hvørki at leita sær vitan frá heimsspekingum ella konsultera sín egna stóra og fjøltáttaða akademiska førning fyri at finna prógvini fyri, hvussu nógv relasjónir hava at siga í námsfrøðini og fyri tann skyld í allari menniskjaligari samveru. Tað høvdu egnar royndir víst honum.

Áhugin fyri relasjónsarbeiði var sprottin so lýðandi, meðan hann enn starvaðist sum lærari á Fróðskapar-

*– Hvørja ferð, eg hevði gjørt ein feil, helt eg, at hon hugdi hvassliga at mær. Eg var sannførdur um, at hon ilskaðist inn á meg, og so bleiv eg irriteraður, tí hon var irriterað.*



setrinum og fekst við at skriva fakbøkur við síðuna av. Meira neyvt hendi tað undir kanningararbeiðnum til enskt mæltu bókina "Relate and educate" um pedagogiska leiðslu, sum kom út fyri umleið einum hálvum ári síðan.

– Eg gjørdi kanningararbeiðið fyri umleið fimm árum síðan og var tá úti á fimm dagstovnum og fimm skúlum og setti spurningin, "hvat er góð pedagogisk leiðsla". Høvuðsniðurstøðan var, at góð pedagogisk leiðsla er har, sum góðar relasjónir eru ímillum starvsfólk og leiðslu. Sjálvandi kom eisini annað fram í svarunum, men hatta var høvuðsniðurstøðan, greiddi Jóhannes Miðskarð frá.

Tá hann upp á henda mátan fann út av, hvussu stóran týdning relasjónin hevði fyri góða pedagogiska leiðslu, fór hann at hyggja nærri eftir, um hann eisini sjálvur í sínum arbeiði kundi staðfesta nakað tað sama, sum hann hevði fingið at vita í svarunum úti á skúlunum og dagstovnunum – at góðar relasjónir beinleiðis kundu ávirka úrslit og gongdir rætta vegin.

## Relasjónin í fremstu røð

Tað kundu tær, og fyrstu greiðu ábendingina um tað fekk hann í sambandi við arbeiðið at vegleiða námsfrøðilesandi á Setrinum, sum skrivaðu bacheloruppgávu.

– Nøkur kendi eg, tí eg eisini hevði undirvíst teimum í pedagogiskari leiðslu, onnur hevði eg ongantíð sæð fyrr. Nú varnaðist eg knappliga, at eg nógv skjótari megnaði at vegleiða tey lesandi, sum eg kendi frammanundan, og lyfta tey upp fakliga, so tey kláraðu at gera eina góða bacheloruppgávu. Men í so máta hevði eg tað truplari við teimum, sum eg ikki kendi frammanundan, tí eg visti ikki ordiliga, hvussu tey fóru at uppfata meg, tá eg segði okkurt.

– Tíðin til vegleiðing er avmarkað, eg hevði einar fimm tímar við hvørjum bólki av lesandi, men eftir hesa avdúkingina, gjørdi eg av, at tann fyrsta hálva tíman skuldu vit als ikki tosa um uppgávuna, ella hvørji krøvini vóru ella nakað annað í sambandi við hana. Í staðin brúkti eg tann fyrsta hálva tíman upp á at práta við tey um, hvørji tey vóru, hvaðani tey komu, um tey høvdu stovnað familju, hvat tey gjørdu í frítíðini og so framvegis. Og tey



fingu sjálvandi eisini eitt sindur at vita um meg.

– Við øðrum orðum fór tann fyrsti hálvi tímin bara til at byggja relasjónir. Ein hálvur tími er ein fittur partur av dýrabarari tíð, sum verður tikin út, tá tú bara hevur fimm tímar tilsamans. Men eg haldi veruliga, at tann tíðin var givin ógvuliga væl út, staðfesti Jóhannes Miðskarð.

Hann hevur ikki bara royndir við leiðslu ella sum akademikari og lærari, men hevur eisini hollar royndir á gólvinum á nógvum sera ymiskum økjum, og honum dámar framvegis stak væl at taka vanligt námsfrøðiligt arbeiði av og á.

Við sínum nýggja sjálvstøðuga virksemi liggur tað eisini væl fyri at taka námsfrøðiligt ella líknandi arbeiði ávísar tíðir á árinum, tá lítið er at gera við at halda fyrilestrar og sovorðið. Tað er serliga galdandi fyri teir fýra vár- og summarmánaðirnar apríl, mai, juni og juli.

Tá tann laka tíðin við fyrilestrum byrjaði í vár, tók hann arbeiði sum avloysari á einum bústovni í Keypmannahavn fyri fólk við breki í nakrar mánaðir. Har fekk hann aftur høvi at arbeiða fakliga við relasjónum.

Á stovninum vóru nógv búfólk við autismu, og tá er tað ógvuliga nógv, sum eitt starvsfólk skal læra um tann einstaka – gerandisdagurin skal ofta út í æsir fylgja einum skema, og ófyrireikaðar broytingar kunnu lætt skapa ruðuleika.

Fyri Jóhannes Miðskarð hava relasjónirnar til búfólk, starvsfólk, foreldur og onnur hinvegin so nógv at siga, at tað tekur hann fram um alt annað.

Men samstundis er hann við egnum orðum soleiðis skrúvaður saman, at honum dámar avbjóðingar í arbeið-



*Nógv fólk vóru komin saman hetta kvøldið í Klaksvík, fyri at lurta eftir Jóhannesi Miðskarð*

num. Honum dámar best at fáast við tey, ið eru truplast at fáast við, og sum flest øll onnur starvsfólk fegin vilja sleppa undan at hava ov nógva ábyrgd av.

– Har var so ein, ið eg kom at hava nógv við at gera, sum hevði tríggjar ymiskar diagnosur – autismu, Downs syndrom, og OCD. Tríggjar diagnosur, sum vanliga eru sera avbjóðandi hvør sær. Men hon var tó rímiliga væl fyri menniskjansliga, og viðvíkjandi tí at skapa relasjónir. Og so hevði hon humor, og tað, sum eg veruliga vil siga við hesi søguni, er, hvussu effektivur humorur er í relasjónum.

– Av tí at hon bæði hevði autismu og OCD, var sjálvandi ein rúgva av ritualum og mannagongdum, sum skuldu fylgjast. Til dømis tá hon skuldi í song og fyrst busta tenn. Munnurin skuldi skolast fimm ferðir aftaná, og tað mátti teljast, og hon skuldi vaska hendur, smyrjast við ymiskum sløgum av salvu og so framvegis, og hon fylgdi væl við, at alt bleiv gjørt rætt, greiddi Jóhannes Miðskarð frá.

## Humorur og látur

Men at gera alt rætt kláraði hann ikki altíð. Hevði hann verið aðrastaðni á stovninum í nakrar dagar og ikki verið um hana, hevði hann sum regul gloymt nógvar mannagongdir, tá hann kom aftur, og hann kundi til dømis finna upp á at geva henni salvu í skeivari raðfylgju.

Tá bleiv humorurin bjargingin.

– Ístaðin fyri at læra meg øll ritualini og mannagongdirnar, royndi eg beinanvegin at finna út av, hvat hon helt vera stuttligt, og eg royndi eisini at hyggja rundan um meg í íbúðini hjá henni fyri at fáa eina peiling av, hvat hon gekk upp í. Eg royndi eisini altíð at rósa henni fyri, hvussu væl hon dugdi hetta ymiska, tá hon til dømis skuldi hjálpast í song og skuldi ígjøgnum allar sínar prosedýrur, og gjørdi eg okkurt skeivt, so royndi eg at smíla meg burtur úr tí.

– Tá eg so gloymdi, hvussu raðfylgjan á salvunum skuldi vera sigur hon upp á ein humoristiskan máta við meg: "Johannes, jeg synes, du glemmer". Eg segði so okkurt um, hví tann og tann salvan knappliga skuldi vera fyrst, og at okkurt skuldi á føturnar – og so gloymdi eg aftur. Tá spurdi hon, "Johannes, er du syg?". Eg sigi, "nej, jeg er ikki syg, men jeg

synes, det er forfærdelig sjovt”, og so flenti hon í kíki og vit klemmaðust.

– Hetta vísir bara, hvussu góðar relasjónir, serliga saman við humori, onkuntíð kunnu skúgva tørvin fyri strukturi og føstum mannagongdum til viks. Hetta skal als ikki skiljast, sum at eg haldi, at alt altíð eigur at verða gjørt soleiðis free-style, sum eg gjørdi. Men kemur tú á ein stovn at arbeiða í fýra mánaðir, og skalt taka tær av einum búfólki, sum til dømis hevur autismu, Downs syndrom og OCD, so hevur tú kortini ongan livandi møgleika at læra teg alt tað rituella. Men tað, tú kanst royna í staðin, tað er at skapa góðar relasjónir, segði Jóhannes Miðskarð.

## Oyðileggjandi fordómar

Hann minti á, at tað er við relasjónum sum við so nógvum øðrum, sum tað tekur langa tíð at byggja upp – nevniliga at tær eru skjótar at bróta niður aftur. Relasjónirnar eru skroypiligar, og tí skal ansast eftir teimum.

Tað kann saktans vera tilvild ella misskiljingar, ið eru orsøk til, at góðar relasjónir millum fólk syndrast. Ella kanska ongantíð koma í eyga, soleiðis sum tað mundi hent fyri Jóhannes Miðskar sjálvan og ein av starvsfeløgunum á danska bústovninum, har hann arbeiddi sum avloysari í summar.

Hann greiðir soleiðis frá:

– Tað var ein kvinnuligur starvsfelagi, deiliga útvend og lívlig, og eg merkti beinanvegin, hvussu øgiliga væl hon dugdi við búfólkunum. Tey vóru 10, og hon dugdi at fáa øll at flenna, og hon dugdi at fáa øll at slaka eitt sindur við øllum ritualunum. Hon gjørdi altíð onkran lekran mat, so vóru pannukøkur á skránni og allatíðina okkurt sovorðið.

– Men tá vit vóru í starvsfólkarúminum, hevði eg eitt sindur ringt við at hava eina góða relasjón við hana. Hon byrjaði at blíva ógvuliga kritisk – ella soleiðis uppfataði eg tað.

– Hon hevði arbeitt har í 15 ár, so hon kendi fólk, mannagongdir og vanar út og inn. Eins og á føroyskum stovnum skuldi ansast væl eftir, at tað ikki bleiv oysslað, og tí galt tað um at minnast, at til dømis handan og hasin eta ikki ost, so tað er ikki neyðugt at koyra ost upp á breyð til 10 fólk, tá tað er nóg mikið við átta og soleiðis. Eg var nýggjur, kendi ikki vanarnar, ella eg mintist teir ikki, so eg gjørdi okkurt skeivt hvørja ferð.

– Hvørja ferð, eg hevði gjørt ein feil, helt eg, at hon hugdi hvassliga at mær. Eg var sannførdur um, at hon ilskaðist inn á meg, og so bleiv eg irriteraður, tí hon var irriterað. Og afturat helt eg, at hon snerkti at mær, tá eg sat og skrivaði í starvsfólkarúminum, og eg var vísur í, at tað var tí, hon argaðist inn á meg.

– Eg bygdi bara meira og meira oman á kensluna, at hon var forferdilig, og eitt kvøldið, tá eitt annað starvsfólk var til arbeiðis saman við mær, kláraði eg ikki at halda mær, men segði, at eg helt tað vera ræðuligt at arbeiða saman við hinari. Tá sigur henda við meg, at hin virkaði so øgiliga sosial úteftir og dugdi ógvuliga væl við relasjónum, men at hon í veruleikanum hevði torført við at



*Kemur tú á ein stovn at arbeiða í fýra mánaðir, og skalt taka tær av einum búfólki, sum til dømis hevur autismu, Downs syndroim og OCD, so hevur tú kortini ongan livandi møgleika at læra teg alt tað rituella. Men tað, tú kanst royna í staðin, tað er at skapa góðar relasjónir, segði Jóhannes Miðskarð*

samskifta við nýggj starvsfólk. Og tað er ikki, tí hon ikki dámar teg, men bara tí, hon ikki veit, hvat hon skal siga við teg inni í hasum rúminum.

– Eg sigi ok, so veit eg tað, og so fór eg spakuliga at spyrja og tosa um leyst og fast við hesa her, ið eg helt vera so ræðuliga, og tá gekk skjótt hjá okkum at fáa bygt eina góða relasjón upp. Men so var tað hetta andlitsbragdið og ljóðið, hon gjørdi. So einaferð, tá eg kendi hana ordiliga væl, spurdi eg hana, "tú, tú gert ofta eitt sovorðið ljóð og snerkir, tað er ikki rætt at gera so ímóti einum øðrum persóni, uttan so, at mann kennist rættiliga væl, ha?" Og hon svarar, "nei, veist tú hvat, hatta geri eg, tí eg havi hoyfepur".

– Síðan tá fingu vit simpulthen ta bestu relasjónina, og tá avloysarastarvið var av, var hon tann, sum eg hevði ringast við at siga farvæl við – tað var nær við, at eg táraði, greiðir Jóhannes Miðskarð flennandi frá.

## Eitt víðfevnt evni

Áhoyrararnir vóru engasjeraðir og viðmerktu og spurdu dúgliga, meðan Jóhannes Miðskarð greiddi frá, so prátið fór víða, tó at fokus alla tíðina var á relasjónum og relasjónsarbeiði.

Greitt var frá ymisku sløgunum av relasjónum, teimum trimum p'unum, sum siga, at í relasjónum skal ein vera privatur, persónligur og professionellur.

– Tað hava øll, sum hava gingið á pedagogútbúgvingini, hoyrt um, so eg havi hug at fara eitt sindur djúpri at vita, hvat tað er at vera privatur, at vera persónligur og at vera professionellur, segði Jóhannes Miðskarð.

Og nú slapp Søren Kierkegaard framat, tí at vera privatur hevur nakað við autensitet at gera, segði Jóhannes Miðskarð, og um hetta hugtakið var mæti danski heimsspekingurin greiður: At vera autentiskur, tað er, at tú ert tú, at tú ikki ert eitt kopi av øðrum, at tú ikki bara heldur tað, sum onnur halda, men at tú heldur tað, sum tú heldur.

Men at vera autentiskur er so nógv annað eisini, greiddi Jóhannes Miðskarð frá – meira enn hann kláraði at siga í fimm setningum.

Týdningarmikið er tað tó at vita, at til tað autentiska hoyrir eisini tað at tora at vera sárbarur.

Aftur bleiv ein endi spunnin til Hannah Arendt og hennara lýsing av tí gamla rómverska sjónleikinum sum ímyndin av bæði tí persónliga og professionella.

Tá rómverjar spældu sjónleik fyri 2000 – 2300 árum síðan, brúktu tey sonevndar persona-maskur, ella skortar, og skorturin avgjørdi leiklutin. Var talan um soldátar, so vístu sama slag skortar tað, bakarar, smiðir, mammur og so framvegis, øll høvdu tey sín eyðkenda skort. Men opið til munnin í hvørjum skorti var so stórt, at stórur partur av andlitinum aftanfyri sást. Tí so kundi leikarin geva lív til sín leiklut. Vóru tað 30 soldátar, so var ongin ivi um tað, tí skortarnir vóru líka. Men stóru munnopini góvu teimum hvør sín samleika.

– Tað er ein góð mynd av okkum. Tit, sum sita her, eru øll námsfrøðingar, tit hava nakað í felag, men í tí arbeiði, hvør einstakur útinnir sum námsfrøðingur, skulu vit eisini síggja menniskjað aftanfyri. Og tá tit koma heim skulu tit minnast til at leggja maskuna, og tað er eisini poengið hjá Hannah Arendt, tá hon lýsir tað persónliga og tað professionella við hesum persona-maskunum hjá teimum rómversku sjónleikarunum, segði Jóhannes Miðskarð.

## Uppgávur

Námsfrøðingarnir sluppu ikki bara at sita á reyvini og lýða á í tveir tímar í Snjallubjallu, men blivu við millumbilum aktiveraðir við ymiskum uppgávum. Ein uppgáva legði upp til at brúka teknikkin appreciative inquiry, sum gongur út upp á, at taka útgangsstøði í onkrum, sum riggar, til dømis einari góðari relasjón, og síðan kanna, hvat riggar og hví, heldur enn at taka útgansstøði í onkrum, sum ikki riggar, og síðan royna at finna út av, hví tað ikki riggaði.

Luttakararnir fingu eisini spurningin, "hvat ætlar tú at gera á arbeiðnum í morgin fyri at skapa betri relasjónir?"

Eisini skuldu tey finna saman tvey og tvey, har annar persónurin síðan skuldi siga eina góða søgu um eina góða relasjón, sum tað var eydnast at skapa, og síðan skuldu tey lýsa søguna við í mesta lagi fimm orðum.

# Jamen, námsfrøði er relasjónir

**Luttakararnir á evniskvøldinum um relasjónir vóru væl nøgdir. Sjálvt um relasjónsskapan nærum liggur í merginum á námsfrøðingum, so er tað altíð gott og gevandi at sleppa at reflektera um evnið, ljóðaði boðskapurin. Og ongin dugir sum Jóannes Miðskarð at greiða frá um evnið, vóru fólk á einum máli um**

ORÐ OG MYNDIR:
INGOLF S. OLSEN – PRESS

– Jamen, námsfrøði ER relasjónir, so hetta evnið eigur altíð at vera týdningarmikið fyri okkum námsfrøðingar. Tað finst heldur ongin millumloysn – um ein relasjón ikki er góð, so er hon ring, so einfalt er tað. Skrekkurin hjá einum dagstovnanámsfrøðingi er at fáa at vita frá einum barni, at "tú sá meg ikki", tí tá er relasjónin burtur.



*Skrekkurin hjá einum dagstovnanámsfrøðingi er at fáa at vita frá einum barni, at "tú sá meg ikki", tí tá er relasjónin burtur, segði Judith R. Petersen úr Fuglafirði, sum starvast sum námsfrøðingur á Kambi á Kambsdali*

Soleiðis segði Judith Reinert Petersen, námsfrøðingur, úr Fuglafirði, tá hon bleiv spurd, hvat hon fekk burtur úr at taka lut í evniskvøldi um relasjónir.

Hon fegnast um, at ráðini hjá Føroya Pedagogfelag skipa fyri tiltøkum við fakligum innihaldi og vónar, at tað fer at halda fram.

– Mær dámar væl at kunna stinga fingurin í jørðina og fáa fylt fakliga ryggsekkin av og á. Eg royni altíð at sleppa avstað til sovorðin tiltøk, men eg veit væl, at hjá nógvum er talan um rokutar arbeiðsdagar og sovorðið, so tað er ikki ein sjálvfylgja hjá øllum at kunna fara,

– Hetta evniskvøldið var framúr, og øll skuldu hoyrt handa fyrilesturin hjá Jóhannesi Miðskarð. Evnið er so



– Tað er altíð gott at vera mint á tað grundleggjandi av og á, og tað bleiv eg. Í fyrsta lagi nakað so einfalt sum at verða meira tilvitaður um at vera í eini relasjón. Eisinii hetta við at vera rúmligur, at duga at seta seg sjálvan til viks, tá tað er rætt at gera tað, og at tora at vísa sína egnu sárbarheit, vóru evni, sum søgdu mær nógv, segði Yvonna Djurhuus úr Havn, námsfrøðingur á bústovninum við Grønlandsvegin í Havn



Eg bleiv varug við hetta evnistiltakið, tá ein starvsfelagið spurdi, um eg ikki hevði hug at fara. Eg helt beinanvegin, at tað ljóðaði stak áhugavert, og eg fekk eisini nógv burtur úr, segði Elin Margreta Jacobsen úr Gøtu, sum starvast sum námsfrøðingur á dagstovninum Lítlafløtti á Strondum

týdningarmikið, og hann dugir so sera væl at leggja fram, ikki minst at gera tað stuttligt, segði Judith, sum arbeiðir á dagstovninum Kambi á Kambsdali.

## Gott við áminning

Hjá Yvonnu Djurhuus í Havn var tað eisini fakligi áhugin, ið dróg, men hon ljóðaði næstan umberandi, at hon skal hava teknað seg til evniskvøldið.

– Eg nærkist pensjónsaldrinum, so eg eri kanska ikki tann, sum havi mest brúk fyri at sleppa við til sovorðið. Men ok, eg haldi ikki, at eg havi tikið plássið frá nøkrum, og eg má viðganga, at enn eri eg líka forvitin eftir vitan og at halda meg nøkulunda dagførda fakliga, sum eg var á yngri árum, segði hon.

Nógv fekk hon eisni burtur úr.

– Ja, tað haldi eg avgjørt. At skapa relasjónir er so stórur partur av tí at vera námsfrøðingur, ikki minst í mínari útbúgving frá Albertslund Børnehaveseminarium, har tað var KRAP, sum var útgangsstøðið.

– Men tað er altíð gott at vera mint á tað grundleggjandi av og á, og tað bleiv eg. Í fyrsta lagi nakað so einfalt sum at verða meira tilvitaður um at vera í eini relasjón. Eisinii hetta við at vera rúmligur, at duga at seta seg sjálvan til viks, tá tað er rætt at gera tað, og at tora at vísa sína egnu sárbarheit, vóru evni, sum søgdu mær nógv. Fyrilestarhaldarin var eisini sera dugnaligur, so eg havi bara gott at siga, segði Yvonna.

*Krista Hvannastein, forkvinna í Námsfrøðingaráðnum bjóðaði vælkomin og greiddi eitt sindur frá virkseminum hjá ráðnum. Ráðið roynir sum frægast at spjaða síni tiltøk kring landið, og hesa ferð bleiv tað so í Klaksvík*



KRAP er stytting fyri danska heitið Kognitiv, Ressourcefokuseret og Anerkendende Pædagogik.

Yvonna arbeiðir á bústovninum hjá Almannaverkinum við Grønlandsvegin í Havn.

## Bæði ja og nei

Eisini Elin Margreta Jacobsen úr Gøtu legði dent á, at relasjónir fylla so nógv í sjálvari námsfrøðiútbúgvingini.

– Tær eru í veruleikanum grundarlagið undir øllum, og tí haldi eg eisini, at tað altíð er eitt gott fakligt evni at taka upp. Eg bleiv varug við hetta evnistiltakið, tá ein starvsfelagið spurdi, um eg ikki hevði hug at fara. Eg helt beinanvegin, at tað ljóðaði stak áhugavert, og eg fekk eisini nógv burtur úr, segði hon.

Elin Margreta arbeiðir á dagstovninum Lítlafløtti á Strondum, men spurd um tað verður tosað nógv um relasjónir á stovninum, tá evnið nú fyllir so nógv í útbúgvingini, er svarið bæði ja og nei.

– Tað er ikki eitt hugtak, sum alla tíðina verður havt á lofti, men tað er tað kortini óbeinleiðis. Tí vit eru alla tíðina í relasjónum, tá vit tosa um eitt nú trivnað. Vit brúka tó modellið hjá TÍTT, Tiltøk í Tøkum Tíma, tá vit meta um trivnaðarstøðuna hjá børnum, og har brúka vit litir –



*Námsfrøðingaráðið borðreiddi við suppu, áðrenn tiltakið byrjaði*

grønt, gult og reytt. Tí tosa vit ikki so nógv beinleiðis um relasjónir, sum í hasum modellinum, sum Jóhannes Miðskarð brúkti á evniskvøldinum í Klaksvík, segði Elin Margreta.

Í modellinum, sum Jóhannes Miðskarð brúkti, og sum Elin Margreta sipar til, kann hvørt starvsfólk á einum stovni máta styrkina á relasjónini, sum viðkomandi hevur við hvørt einstakt barn, til dømis á eini barnagarðsstovu.

Modellið er einfalt, mátingin verður gjør við at tekna tríggjar ringar á eitt pappír, og so seta nøvnini á børnunum á ringarnar alt eftir, hvussu sterk relasjónin er – er relasjónin við eitt barn av tí besta, verður navnið skrivað í innasta ringin, er relasjónin miðalgóð, verður navnið skrivað í mittasta ringin og er hon vánalig, verður navnið skrivað í tann uttasta ringin.

Hvørt einstakt barn skal helst hava pláss í innasta ringinum hjá onkrum



*Kaffisteðgur*

starvsfólki, tí annars er illa statt og sannlíkt, at tað mistrívist.

Tað var Námsfrøðingaráðið hjá Pedagogfelagnum, sum skipaði fyri evniskvøldinum um relasjónir, og Krista Hvannastein, forkvinna í ráðnum, var væl nøgd – bæði við góðu undirtøkuna og við sjálvt evniskvøldið, sum Jóhannes Miðskarð megnaði at lyfta høgt í fakligari dygd og eisini undirhaldsvirði.

# Eftirkannið limaskapin

Aðalfundurin hjá Føroya Pedagogfelag verður 2. mars, og tí sambandi heita vit á limirnar um at eftirkanna limaskapin, at hann er virkin.

Tað er sjálvandi avgerandi við virknum limaskapi, um ein ætlar at atkvøða og hava ávirkan á aðalfundinum, men uppaftur verri man tað vera fyri tey flestu, um limaskapurin er steðgaður vegna vantandi limagjald, uttan limurin er vorðin varugur við hetta.

Hetta kemur meira enn so fyri, oftast í sambandi við, at limurin hevur fingið nýggjan arbeiðsgevara, men tað kunnu eisini vera aðrar orsøkir.

Avleiðingarnar av mistum limaskapi kunnu gerast álvarsamar, tí øll limarættindi, eitt nú samlagstrygging, eru treytað av virknum limaskapi og eru mist í somu løtu, sum limaskapurin dettur burtur.

Tú kanst kanna tín limaskap við at eftirkanna, um limagjald framhaldandi verður trekt av lønini, men ert tú iva, set teg so í samband við Pedagogfelagið á tlf. 357576 ella við teldupósti til pedagog@pedagogfelag.fo

*við ynskjum um eini*

# Góð Jól



& eitt eydnuberandi nýggjár við tøkk fyri gott samstarv